# Gamla Reinsarí

**Við stórum nøvnum sum Jens Marna Hansen og Hanus G. Johansen á skránni var lagt upp til eitt sera hugnaligt kvøld í Gamla Reinsarínum fríggjakvøldið, tá ið OD-bólkurin úr Studentaskúlanum í Hoydølum skipaði fyri stórum cafékvøldi til frama fyri ársins skúlaverkætlan í Niger**



*Fløguaktuelli Jens Marni Hansen undirhelt …*



*… og tað gjørdi Allan Davidsen eisini*



## Operatión Dagsverk

Annika Hedegaard Isfeldt

Gamla Reinsaríið var fríggjakvøldið ramman um eitt hugnaligt cafékvøld í ektaðum OD-stíli. Við OD-plakatum á hvørjum stolpa, fýrfatsljósum og einum spentum OD-bólki var klárt til at taka ímóti nógvu gestunum, sum høvdu leitað sær oman á Reinsaríið í illveðrinum.

– Eg varð satt at siga bilsin um, hvussu nógv fólk komu oman fríggjakvøldið. Vit væntaðu ikki tað heilt stóra, tí vit høvdu ikki gjørt serliga nógv fyri at upplýsa um tað ella fáa tað út í miðlarnar, sigur Mortan Østerø, limur í OD-bólkinum í Hoydølum.

### Til frama fyri 4. fátækasta landinum

- OD hevur høvuðssætið í Keypmannahavn og tískil hevur ein stórur partur av OD-arbeiðinum sum heild høvuðssæti í Danmørk. Av hesi orsøk meta vit í OD-bólkinum tað vera sera týdningarmikið eisini at kunna føroyingar um OD, tí nógv framvegis ikki hava hoyrt um felagsskapin, hóast hann longu hevur eksisterað í heili tíggju ár í Føroyum. Eg hopi og vóni, at fólk tóku tað, vit søgdu, til sín – bæði næmingar, sum fara út at arbeiða 5. november, men eisini vanlig fólk, sum møguliga vilja hava ein OD'ara út at gera okkurt handaligt arbeiði fyri seg á degnum. Tað er umráðandi, at fólk vita, hvørjum tey stuðla. Vit halda ikki, at man skal stuðla nøkrum blint, man eigur at hava ein møguleika fyri at læra verkætlanina væl at kenna, áðrenn man avger, um man vil stuðla henni ella ikki. Tá ið man so er so væl kunnaður um verkætlanina, sum man kann verða, skal tað sjálvandi eisini vera gjørligt at siga nei, um man ikki heldur, at hetta er ein verkætlan, man kann standa inni fyri ella ynskir at stuðla. Av hesi orsøk eru tvey umboð úr høvuðsskrivstovuni í Keypmannahavn eisini í Føroyum í vikuni greiða frá verkætlan ársins í Niger.

### Niger heimsmet í analfabetismu

Verkætlanin í Niger snýr seg um at byggja 19 skúlar í vestafrikanska landinum, sum fara at tryggja 2100 børnum eina skúlagongd og harvið eisini ein møguleika fyri einari øðrvísi framtíð. Nógvir eru trupulleikarnir í Niger. Yvir 60 prosent av fólkinum livir fyri undir ein dollara um dagin og landið hevur heimsmet í analfabetismu – yvir 85 prosent av íbúgvum Nigers duga hvørki at lesa ella skriva. Nigerska stjórnin hevur ikki ráð at gera skúlar og útbúgvingarstøðið í Niger hevur sostatt verið óbroytt seinastu tjúgu árini. Væntandi útbúgvingarstøðið hevur í mong ár verið við til at halda landinum niðri og forða fyri, at menning hevur verið. Tað tykist eins og, at Niger er komið inn í eina ónda ringrás, sum tað er trupult hjá teimum at bróta úr uttan eina hjálpandi hond uttanífrá. Samstundis tykist tað sum, at umheimurin hevur gloymt Niger. Hóast landið er millum fátækastu lond heimsins, hevur menningarhjálpin seinastu árini verið sera lítil í mun til hvussu nógvan stuðul, onnur fátøk lond fáa.

Eins og undanfarnu árini fokuserar OD á útbúgving sum ein vegur úr stóra fátækradøminum. Fokus verður í verkætlanini serliga lagt á at fáa gentur og nomadudreingir í skúla, tí tað vanliga eru hesir bólkar, sum hava trupult við at passa eina vanliga skúlagongd í almennu skúlum Nigers.

Fólkavøksturin í Niger er tann størsti í heiminum; kvinnurnar fáa í miðal 7-9 børn og mamman hevur tískil sera nógvar arbeiðsuppgávur í heiminum. Hóast mammurnar í nógvum førum fegnar vilja senda døtrarnar í skúla, hava tær ikki møguleika fyri hesum, tí tey ikki kunnu fáa húsarhaldið at hanga saman uttan hjálpina frá gentunum. Um ein nigersk genta er so heppin at koma í skúla, verður hon aloftast tikin úr skúlanum aftur, áðrenn hon er liðug, fyri at verða gift og flyta til verfamiljuna. Fyri at bøta um hesar trupulleikar og geva gentunum ein møguleika fyri at koma í skúla og læra um rættindi teirra, bjóðar verkætlanin hjá OD og Care mammunum hjá gentunum ein asna, ið skal gera arbeiðið hjá familjunum lættari, soleiðis at tørvurin av arbeiðsmegini hjá gentuni verður minni. Umframt hetta skulu foreldrini hjá gentuni undirskriva nakrar hjúnarlagsavtalur, sum skulu tryggja, at gentan ikki

Sosialurin